

# Ársins listaverk: Skulpturúrin í Hoydølum

Studentar kring allan heim hava altíð gingið á odda í uppgerðini við tað traditionella og konventionella, og farna árið var einki undantak. Studentarnir í Hoydølum hava enn einaferð brotið upp úr nýggjum við slóðbrótandi list. Hans Pauli Olsen og Janus Kamban kunnu fara heim, tá fíntfølandi hendurnar og óavmarkaða hugflogið fáa fría ræsur í Dalinum Fagra. Orð eru fátøk, og vit lata myndina tala fyri seg.



# Ársins tilboð: Kiri Te Kanawa

Av øllum tilboðum gjøgnum árið í Miklagarði ella Samkeyp kundu føroyingar í august mánaði njóta nýsælandsku operasangarinnuna Kiri te Kanawa á Listastevnu Føroya fyri einans 950 krónur. Allar sjónvarpslýsingar um bíligar eplasekkir og trý Twix fyri 10 krónur kundu pakka saman, tá sopranrøddin skúgvaði øll onnur tilboð til viks. Loksins sluppu Palleba og Marsanna upp í mentanarelituna í Norðurlandahúsinum.



# Ársins frisura: Karl Anton Klein

Tann føroyski Jimmy Hendrix. Eingin slær rockaran úr áttatiárunum niðri á Margarinfabrikkini. Stílurin hjá Karl Anton er gjøgnumførdur frá topp til tá, og fyri at halda stílin við líka jammar hann burturav saman við tannáringum í 48 Pages, Speaker og Lama Sea. Vit kunnu leggja afturat, at bæði Høgni »Zeppelin« Djurhuus og Halleluja-Sofus eisini vóru vigaðir til henda heiðurin.



# Ársins vallyfti: Johan Hot

Tað stóð ikki á valfleski í 2004. Undan løgtingsvalinum í januar og býráðsvalinum í november vóru fjølmiðlarnir á tremur við vallyftum: skattalættin, gransking og íløguraðfestingar, men sum ikki einaferð hevði Johan Hot í lesarabrævi í oktober mest nýskapandi frambrotið í føroyskum politikki: tey gomlu skulu hava meiri øl og vín, tí tað stimbrar heilsu, hugna og trivnað, og ellisheimini skuldu sambært Hottinum taka kappingina upp við mastodontarnir Platform og Éclipse. Veruligur framburður, Johan!





## Virkisleiðari

P/F United Seafood søkir eftir virkisleiðara til virkið á Toftum. Virkisleiðarin skal hava ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum á Toftum. Virkisleiðarin luttekur aktivt í søluarbeiðinum. Virkisleiðarin myndar virkið úteftir.

P/F United Seafood Toftir framleiður saltfisk. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigi. Arbeiðið á United Seafood Toftir fer fram sambært innaneftirlitsskipan. Í 2003 virkaði virkið uml. 7.000 tons av ráværu.

**Uppgávurnar hjá virkisleiðarinum verða m.a.**

- Leiða arbeiði á United Seafood Toftir
- Gera dag- og vikuroknskapir
- Gera rakstrarætlan.
- Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum.
- Samstarv um keyp av ráværu.
- Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarar.

**Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar**

- Relevanta útbúgving á passandi støði.
- Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski.
- Leiðslueginleikar.
- Góðan málkunnleika.
- Góð samstarvs- og kommunkatiónsevni.

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Lønina tosa vit um.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 2. januar 2005.

Møguligir umsøkjarar kunna seta seg í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

REPROZ

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"